*Søgulig hending:*

# Løgmaður vitjar fyri fyrstu ferð á oljupalli

*Fyri fyrstu ferð nakrantíð hevur ein føroyskur løgmaður sett beinini á ein oljuboripall. Hetta hendi tá Anfinn Kallsberg, ílatin trygdarbúna, sum tað sømir seg røttum oljumanni, týsdagin var og vitjaði norska oljuboripalli, Snorre, sum liggur í miðjum Norðsjógvi.*




*Týsdagin setti Anfinn Kallsberg, løgmaður, fyri fyrstu ferð, beinini á ein oljuboripall. Hetta hendi, tá hann var og vitjaði norska pallin Snorre, sum liggur í miðjum Norðsjógvi*
*(Mynd: Jan Müller)*

ORÐ OG MYNDIR:
JAN MÜLLER
ÚR STAVANGER

Mánadagurin 24. og týsdagurin 25. august fara uttan iva at vera mettir sum týðandi og søguligir dagar, tá oljusøga Føroya helst verður skriva ein dag. Tá vitjaði ein føroyskur oljumálaráðharri og løgmaður fyri fyrstu ferð á oljupallum í Norðsjónum - sum ein náttúrligur liður í fyrireikingunum til eina komandi føroyska oljuvinnu.

Eyðun Elttør, nýkosni oljumálaráðharrin fór mánadagin við tyrlu úr Bergen út á Veslefrigg boripallin hjá Statoil. Dagin eftir fór so sjálvur løgmaður, Anfinn Kallsberg, á eina líknandi ferð út á oljupallin Snorre umleið 150 kilometrar úr landi. Sosialurin var saman við løgmanni og fylgisneytum hansara.

**Í yvirlivilsisbúna**

Eftir at hava verið á almennari vitjan í norska høvuðsstaðnum og har vitjað Harald kong, Kjell Magne Bondevig, forsætisráðharra, Marit Arnstad, olju- og orkumálaráðharra og Peter Angelsen, fiskimálaráðharra varð tíðliga týsmorgunin gjørt klárt at fara út í Norðsjógvin. Saman við løgmanni vóru eisini Marjun Hanussardóttir, løgmansstjóri, Herluf Sigvaldsson, deildarleiðari á løgmansskrivstovuni, Mogens Holm Petersen, ráðgevi í føroyskum viðurskiftum í danska uttanríkisráðnum Finn Christiansen, norski konsulin í Føroyum.

Eftir at hava fingið eina frágreiðing um strongu trygdarviðurskiftini lótu løgmaður og fylgi seg í teir eyðkendu reyðu yvirlivilsisbúnarnar, sum tey, ið fara út á boripall við tyrlu, skulu vera ílætin.

Túrurin út á Snorrapallin tók góðan tíma. Á leiðini var høvi til at síggja fleiri av teimum stóru og kendu oljupallunum í Norðsjónum, teirra millum Troll, Gullfaks og Statfjord.

Áðrenn lent varð á tyrlupallinum á Snorre varð flogið tætt fravið pallinum nakrar ferðir, soleiðis at løgmaður betur kundi síggja, hvussu hesin nýggi og fremmandi heimurin sær út úr erva.

Á pallinum vóru føroysku gestirnir sera væl móttiknir. Føroyska flaggið varð vundið á stong, og har varð borðreitt við øllum góðum. Eftir eina stutta trygdarfrágreiðing fingu løgmaður og hini nýggjar búnar og trygdarskógvar.

Síðani var »sightseeing« á pallinum.

**Rullar**

Snorre er ein kombineraður framleiðslu- og boripallur. Um somu tíð, sum oljan kemur upp úr undirgrundini vera nýggj hol borað niður í stóru goymsluna langt niðri í undirgrundini.

Tað óvanliga við hesum pallinum er eisini, at tú kanst faa sjóverk umborð, um tú ikki er vanur at vera á sjónum. Pallurin stendur ikki á føstum beinum, sum teir flestu pallarnir gera, men hann er festur í veirar og rør, ið aftur eru fest í havbotnin. Hetta ger, at hann flytur seg eitt vet til síðuna av og á.

Tað er norska oljufelagið Saga Petroleum, sum er operatørur. Tvs. at tað er henda fyritøkan, sum stendur fyri vitjan løgmans. Og sigast má at her gekk alt sum smurt. Alt varð væl lagt til rættis frá byrjan til enda.

Føroysku gestirnir vóru eisini sera hepnir við veðrinum. Tað var sólskin henda dagin úti í Norðsjónum.

Snorre er bert ein av mongum oljupallum í Norðsjónum. Pallurin liggur stutt frá bretska markinum, og er møguligt at síggja fleiri av oljupallinum á bretskari síðu higani.

**Stór framleiðslan**

Samlaða oljuframleiðslan á Snorre er ein tann størsta á einum einstøkum palli í Norðsjónum. Samlaða framleiðslan er omanfyri 300.000 tunnur um samdøgrið. Umframt egnu framleiðsluna verður eisini olja frá einum av sokallaðu satelittunum á havbotninum nærhendis, nevndur Vigdís, flutt umborð á Snorre og higani flutt víðari til Statfjordfeltið, har oljan so verður flutt víðari á marknaðin.

Umleið 150 mans eru umborð á Snorre. Eins og á øðrum oljupallum verður her gjørt alt fyri at økja um úrtøkuna tvs. at fáa sum mest av olju upp úr goymslunum á lættasta og skjótasta hátt. Á Snorre eru teir eisini ernir av, at tað hevur eydnast at økja um úrtøku prosentið úr teimum 30 uppí 45-50%. Nýggja tøknifrøðin ger hetta møguligt.

Arbeitt verður eisini við eini útbyggingarætlan á Snorre-feltinum. Talan er at seta upp enn ein pall á feltinum, soleiðis at framleiðslan verður størri og meira effektiv. Vit tosa um milliardir av krónum í nýggjum íløgum.

**Løgmaður hugtikin**

Áðrenn farið varð av aftur pallinum takkaði løgmaður fyri seg og hinar føroyingarnar. Hann helt fyri, at hetta er ein so stór og nýggj verð, at tað tekur tíð at sodna øll inntrykkini. Hann var ikki sørt hugtikin av øllum hesum stóra og nýggja. Anfinn Kallsberg greiddi stutt frá royndunum í Føroyum at byrja eina oljuvinnu.

Leiðin gekk síðani til Sola-floghavnina uttan fyri Stavanger, har løgmaður dagin eftir skuldi hitta umboð fyri norskar oljumyndugleikar og annars



*Føroyska ferðalagið í tyrluni á veg út á boripallin, Snorre. Fremst á myndini er tað Herluf Sigvaldson, deildarleiðari, síðani Marjun Hanussardóttir, løgmansstjóri og Anfinnur Kallsberg, løgmaður sum roynir at fáa eyga á boripallin*
*(Mynd: Jan Müller)*

*Anfinn Kallsberg, løgmaður eftir vitjan á oljupalli í Norðsjónzum:*

# Ein spennandi men eisini ræðandi verð



*– Oljuvinnan er so stór í vavi, at eg dugi illa at ímynda mær so stórar installatiónir við Føroyar, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður (Mynd: Jan Müller)*

***– Hetta var ómetaliga stórt í vavi, og eg dugi ikki rættiliga at ímynda mær so stórar installatiónir rundan um Føroyar, men man skal helst longu nú byrja at venja seg við tankan, sigur Anfinn Kallsberg, løgmaður eftir at hava verið á sínum fyrsta túri á einum oljupalli til havs. Og helst er hetta eisini fyrstu ferð í heila takið, at ein føroyskur løgmaður er gestur á einum oljupalli offshore***

JAN MULLER
ÚR STAVANGER

Annfinn Kallsberg er bæði hugtikin og ræddur, nú hann aftur hevur fingið fast undir fótum. Sjálvur heldur hann hetta vera eina sera spennandi og nýggja verð, men samtíðis er hon eisini sera ræðandi.

Hóast tað krevur ikki einki av dirvi og orku at skula fara út á ein boripall fyrstu ferð, so kendi løgmaður seg sera væl úti á hesum stóra og so nógv øðrvísi arbeiðsplássinum úti til havs.

- Nú var tað gott veður, har vóru góðar umstøður og tú steðgaði ikki so leingi, so har var alt, sum tað skuldi. Men eg veit ikki, hvussu man hevði reagerað, um ein skuldi verið har í upp til 14 dagar, sum oljuarbeiðararnir eru tað.

Løgmaður heldur, at umstøðurnar umborð eru sera góðar, og tað sær út til, at alt er sera væl skipað.

**Eiga at verða við, men...**

Hvat fekk løgmaður so burtur úr at vitja á einum slíkum arbeiðsplássi í oljuvinnu!

- Hetta er ein vinna við ómetaliga stórum perspektivum, og eg dugi at síggja, at man eigur at royna at verða við. Men samtíðis skal eina gera sær greitt, at tað skal vera á einum støði, sum vit megna at handfara. Her eru so veldugar íløgur, sum skulu gerast og so stórar tekniskar avbjóðingar, at tú má fara fram við størsta skili, tá tú fer undir slíkt.

**Mugu stýra sjálvir**

Løgmaður er ikki minni sannførdur um, at vit eiga at fara undir eina slíka vinnu, nú hann hevur vitjað á einum oljupalli og sæð við egnum eygum, hvussu arbeiði fer fram. Men hann er samtíðis sera varin og heldur, at hetta er ein útviklingur, sum vit sjálvir mugu stýra.

- Bara við at vitja í Stavanger sær ein, hvussu stóra ávirkan arbeiði í Norðsjónum hevur á býin her. Og tá skal ein eisini hugsa um, at Stavanger er ein býur, ið er væl størri enn allar Føroyar. So ávirkanin er rættiliga stór, og tí er nógv vit skulu taka hædd fyri, tá vit skulu í gongd.

Anfinn Kallsberg er sera fegin um, at hann skal hava havt hetta høvið á síggja, hvussu arbeitt verður úti á einum oljupalli, og hvussu lívið er har, men hann heldur, at tað eisini er sera avgerandi, at allir politikarar, sum eru við til at taka stórar avgerðir, og ikki bara løgmaður og oljumálaráðharrin, fáa kunnleika til hesa nýggju vinnu og harvið eisini verða við til at stinga út í kortið, hvussu fram skal farast

- Tað er nevniliga ikki bara bara, leggur Anfinn Kallsberg aftrat

**Samarbeiða við allar**

Nú norðmenn vóru teir fyrstu at bjóða einum føroyskum løgmanni og einum føroyskum oljumálaráðharra at vitja og síggja teirra oljuvirksemi spurdu vit Anfinn Kallsberg, um hetta eisini er ein ábending um, at føroysingar fara fyrst og fremst at samstarva við norðmenn, tá talan er um at byggja upp eina oljuvinnu?

- Eg veit ikki, hvat norðmenn leggja í hesa vitjan. Kann bert siga, at eg sjálvur havi fingið eitt innlit í hesa vinnu og eisini havt aðrar møguleikar at hitta norskar politikarar, sum eg haldi seinni kann vera til gagn fyri Føroyar og ikki tá tað snýr seg um olju. Eisini á mongum øðrum økjum.

Løgmaður heldur sjálvur, at vit føroyingar eiga at samstarva við allar tær tjóðir, sum vilja, at ein oljuvinna skal vera góð fyri Føroyar.



*Løgmaður fær frágreiðing um virksemi umborð á Snorra (Mynd: Jan Müller)*



*Soleiðis sær hann út; Snorre, og mann hevur hug at geva løgmanni rætt, tá hann tosar um stórar og ógvusligar installatiónir (Mynd: Jan Müller)*




*Tað er Saga Petroleum, sum eigur Snorra, og teir eru eins og aðrar altjóða oljufyrutøkur sera áhugaðir í eini møguligari oljuvinnu við Føroyar (Mynd: Jan Muller)*